

## Nýggjur landsbókavørður

Mentamálaráðið hevur sett Marjuna Patursson í starvið sum landsbókavørður. Marjun Patursson er 54 ára gomul og útbúgvin bókavørður frá Statens bibliotekskole í Oslo. Á master útbúgvingini í bókasavns- og kunningarvísund við Danmarks Biblioteksskole hevur hon staðið modulini vitanarskipan og bókasavnsleiðslu. Tá landsbókavørðurin seinastu nógvu árini, Martin Næs, í desember 2007 tók við deildarstjórastarvi í Mentamáladeildini á Mentamálaráðnum, varð Marjun Patursson, sett sum virkandi landsbókavørður. Hon hevur verið í starvi sum bókavørður á Føroya landsbókasavni síðan 1982. Í tveimum umførum hevur hon verið avloysari fyri 1. bókavørð og í tveimum umførum verið virkandi landsbókavørður. Harumframt var hon leiðari fyri verkætlanina at samskipa føroysku bókasøvnini í felags bókasavnsskipanina Bókasøvn.fo. Í 2008 varð Marjun Patursson tilnevnd sum limur í Føroya vísindaráð.
Marjun Patursson tekur við starvinum beinanvegin.

# Stava rætt og vinn 25.000 krónur

**Í september fer Føroya Banki at skipa fyri kapping millum ung í 4., 5. og 6. flokki um at stava føroysk orð og setningar rætt. Seks undanumfør verða kring landið, og stóra finalan verður í Havn leygardagin 27. september. Vinnarin fær 25.000 kr. frá Føroya Banka**

KAPPING

Føroya Banki skipar fyri kappingini í sambandi við, at bankin hevur almannakunngjørt nýtt barna- og ungdómskonsept.

Bankin byggir sítt virðisgrundarlag á dugnasemi, eldhuga og framsøkni, og burtur úr hesum virðisgrundarlagnum sprettur nýggja barna- og ungdómskonseptið.

Við kappingini Stava rætt vil bankin skunda undir, at børn og ung menna sín fakliga førleika, og vinningurin á 25.000 kr. verður latin vinnaranum fyri víst dugnasemi.

Dómarar í kappingini verða Bergur Rasmussen og Malan Eyðunsdóttir, lærarar í føroyskum í Tórshavnar Kommunuskúla. Tey bæði hava eisini gjørt spurningarnar, ið eru fleiri enn 600 í tali.

Treytin at vera við í kappingini er, at luttakararnir ganga í 4., 5. og 6. flokki skúlaárið 2008/2009. Áhugað og eldhugað kunnu tekna seg til kappingina http://www.foroya.fo/ her.

### Undanumførini verða á hesum støðum:

Klaksvík 15. sept. kl. 17.00 Húsið
Fuglafjørður 16. sept. kl. 17.00 Mentanarhúsið
Vestmanna 17. sept kr. 17.00 Staðið
Tórshavn 18. sept. kr. 17.00 Margarinfabrikkin
Tvøroyri 20 sept. kr. 13.00 Seglloftið
Sandur 22. sept. kr. 17.00 Ungmannahúsið

Finalan verður í Havn leygardagin 27. september kr. 13.00.

### Fá lærukort í bankanum

Eitt høvuðsmál við nýggja barna- og ungdómskonseptinum hjá Føroya Banka er at geva børnum og ungum vitan og lærdóm. Í hesum sambandi hevur bankin latið gera fimm nýggj lærukort.

Tey fimm lærukortini eru ein roknitalva, eitt bókstavarað, lítla og stóra tabell, eitt kort við ættum og vindmegi og eitt kort við føroyskum málreglum.

Lærukortini eru bæði litrík og snøgg á at líta, og til dømis kortið við ættum og vindmegi er væl egnað at festa á køliskápið heima við hús.

Kortið við málreglum greiðir frá, hvussu tú setir ð, nær tú skalt skriva ir og ur, og hvussu tú skalt seta komma. Kortið er gjørt samsvarandi almennu málreglunum.

Lærukortini eru at fáa á øllum deildum bankans, og framsøkin, sum vilja ogna sær tey, eru vælkomin at støkka inn á gólvið eftir teimum.



### Rentan ger munin

Undanfarnu mongu árini hevur Føroya Banki latið børnum og ungum ókeypis mjadnataskur, mateskjur og handklæðir, tá uppsparingin við Nósa varð sett inn í bankan.

Henda skipan er farin úr gildi. Í staðin bjóðar bankin hægstu rentu í landinum á nýggju Barnauppsparingini, 5,35%.

Við nýggja barna- og ungdómskonseptinum er bankin sostatt farin miðvíst til verka. Børn og ung fáa vitan, tey kunnu brúka, og rentu, ið ger mun.

Nósi fer ongan veg, hóast konseptið er broytt, men hann broytir atferð. Í staðin fyri at bjóða børnum og vaksnum í sín egna føðingardag hvørt ár fer hann nú í føðingardag hjá børnum, ið vinna eina vitjan frá honum.

# Hvørki Føroya Tele ella FK eiga óruddið

Í sambandi við greina- og myndarøðina »Heimsins reinasta oyggjaland« har vit vóru í Vágum fríggjadagin, var myndin til vinstru nýtt sum høvuðsmynd. Stjórin í FK, Finn Nielsen, gjørdi okkum vart við, at tað ikki er Føroya Keypsamtøka, sum eigur hetta óruddið í Miðvági, men harafturímóti Føroya Tele, sum liggur beint við síðuna av. Hesum avvísir stjórin í Føroya Tele, Kristian Davidsen. Sambært deildaleiðaranum hjá telefyritøkuni er tað Miðvágs kommuna, sum eigur óruddið, men hetta er heldur ikki rætt. Vit hava spurt okkum fyri á skrivstovuni hjá kommununi, og har siga tey, at Føroya Gluggi eigur tað. Sagt verður, at talan als ikki er um órudd, men pakning, sum fyritøkan brúkar. Kommunan viðgongur, at hetta ikki fríðkar um og ætlar sær at kanna, um tað ikki ber til at fáa tað at verða minni sjónligt.




